Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Hanna Jensen, løgtingskvinna

Svarari: Bjarni K. Petersen, landsstýrismaður í lógarmálum

Evni: Dagføra útlendingalógina

Spurningar:

1. Hvussu gongur við tvørpolitiska arbeiðinum at dagføra útlendingalógina ella gera nýggja útlendingalóg?
2. Nær væntast, at komið verður á mál og eitt nýtt ella dagført uppskot verður lagt fyri Løgtingið?
3. Hvørjar vóru høvuðsorsakirnar til, at landsstýrismaðurin valdi at seta gongd á arbeiðið at dagføra útlendingalógina fyri Føroyar?
4. Eru ávís evni, har tvørpolitiska arbeiðið hevur vist, at serliga týðiligur tørvur er á at dagføra galdandi rætt í Føroyum á útlendingaøkinum ?

Viðmerkingar:
Seinnu árini eru fleiri og fleiri útlendingar komnir til Føroya enn frammanundan, og útlendingaøkið fyllir tí natúrliga meira í Føroyum, eisini politiskt.

Núgaldandi útlendingalóg fyri Føroyar kom í gildi 25. mars í 2001, og hon er broytt seks ferðir síðani tá. Til samanberingar er danska lógin broytt grundleggjandi mangar ferðir síðani.

Landsstýrismaðurin hevur sett eitt arbeiði í gongd at gera eina nýggja útlendingalóg og sett ein politiskan fylgibólk við fólki úr øllum flokkum í Løgtinginum. Og tað er rós vert og heilt víst neyðugt. Men útlendingaøkið er breitt, og sumt er óivað meira viðkomandi fyri Føroyar enn annað, í øllum førum. Ein slík prosess sýnir ofta, hvar tørvurin er størstur á broytingum.

Tí verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 21. november 2025

Hanna Jensen